ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 9. mars 2010

# Fimm í ár og fimm næsta ár

**Í gjár fekst semja um, hvussu fótbóltslandsliðið skal spæla sínar dystir í komandi EM-undankappingini. Fimm dystir verða spældir í ár og fimm næsta ár, og landsliðið byrjar á útivølli í Estlandi í august**



Hilmar Jan Hansen

Tá lutakastið til komandi EM-undankappingina var í Warshava fyri einum góðum mánaði síðani, komu Føroyar í bólk C, har Italia heilt klárt er mest áhugaverda mótstøðuliðið. Serbia, sum vit eisini vóru í HM-undankappingini saman við, var eitt annað, og so hitta vit aftur Norðurírland, sum vit vóru í bólki saman við í fyrstu undankappingini yvirhøvur. Hini bæði londini vóru Slovenia og Estland.

Eftir var so at fáa lagt eina dystarskrá, ið hóskar øllum liðunum, og í tí sambandi við landsliðsvenjarin, Brian Kerr, aðalskrivarin, Virgar Hvidbro, og nýggi formaðurin í landsliðsnevndini, Niclas Davidsen, í gjár í Beograd og tingaðust við umboð fyri hini londini. Har eydnaðist eisini at fáa semju um, hvussu skráin skal síggja út.

Fimm teir fyrstu dystirnir verða spældir í ár og hinir fimm næsta ár, og tann fyrsti verður í august mánaði á útivølli ímóti Estlandi. Í ár eiga Føroyar heimadyst ímóti Serbia og Norðurírlandi, og næsta ár verða so heimadystir ímóti Slovenia, Estlandi og Italia.

Tað, sum hevði mest at siga undan fundinum, var at fáa dystirnar hjá Føroyum lagdar soleiðis, at tað bar til at sleppa undan dystum, áðrenn føroyska kappingin er farin í gongd og ov langt eftir at hon er liðug. Tað eydnaðist til fulnar, tí í ár eru dystirnir í august, september og fyrru helvt av oktober, og næsta ár eru tveir dystir í juni, ein í august og so aftur tveir í september.



Rógvi Jacobsen í nærdysti við Fabio Cannavaro, tá Italia vitjaði á Tórsvølli í juni 2007

Mynd: Álvur Haraldsen

## EM-dystarskráin

11/08-2010: Estland-Føroyar
03/09-2010: Føroyar-Serbia
07/09-2010: Italia-Føroyar
08/10-2010: Slovenia-Føroyar
12/10-2010: Føroyar-Norðurírland
03/06-2011: Føroyar-Slovenia
07/06-2011: Føroyar-Estland
10/08-2011: Norðurírland-Føroyar
02/09-2011: Føroyar-Italia
06/09-2011: Serbia-Føroyar

# Fleiri brakdystir á skránni

**Fleiri av fyrru dystunum í steypakappingunum hjá bæði monnum og kvinnum eru dystir millum lið, sum ikki eru ókend í finalunum. Og hjá kvinnunum er longu ein av fjórðingsfinalunum endurtøka av finaluni í fjør**



Hilmar Jan Hansen



Karl Vidtfeldt, Elsebeth Vidtfeldt og Leivur Frederiksen, tá lutakastið til steypakappingarnar var í 3-2 í gjárkvøldið

Mynd: FSF

Fyrsta ítøkiliga ábendingin um, at fótbóltsárið av álvara stendur fyri framman, kom í gjárkvøldið, tá lutakast var til bæði steypakappingarnar hjá kvinnum og monnum. Karl Vidtfeldt, sum er formaður í kappingarnevndini hjá Fótbóltssambandinum, hevði dóttir sína, Elsebeth, við í sjónvarpsstovuna í 3-2 at hjálpa sær við lutakastinum.

Nú tað var altjóða kvinnudagur, byrjaði lutakastið við steypakappingini hjá kvinnunum, og har gjørdist mestsum beinanvegin greitt, at finalan í ár ikki verður tann sama sum í fjør, tí longu í fjórðingsfinalunum møtast tey bæði bestu liðini í fjør, KÍ og AB.

Tað merkir næstan við vissu, at tað av liðunum, ið vinnur tann dystin, eisini verður steypavinnari, tí traditión er ikki fyri øðrum í kvinnufótbóltinum, enn at KÍ altíð er við heilt har frammi og at bara eitt av hinum liðunum av álvara megnar at bjóða av. Í fjør var tað AB, men so fæst at síggja, um eitt nú Víkingur kann blanda seg upp í oddastríðið í ár.

### Styrkimeting tiltrongd

Síðani var farið í holt við lutakastið til kappingina um Løgmanssteypið, og har vóru fleiri dystir stak áhugaverdir. Samstundis staðfesti lutakastið, at tíðin kanska er komin til, at ein styrkimeting verður gjørd frammanundan, so fleiri av bestu liðunum ikki trekkja hvørtannað beinanvegin.

Til dømis rendu HB og B36 seg í hvørtannað longu í fyrsta umfari. Bæði tvey hava dubbað seg til komandi kappingarárið og verða roknað millum favorittarnar, men nú sleppur í øllum førum bara annað teirra víðari til fjórðingsfinalurnar.

Føroya mest óhepna steypalið síðstu árini, NSÍ, fekk somu lagnu sum vanligt. Hesa ferð skal NSÍ á útivølli spæla ímóti EB/Streymi, sum bæði vann silvur í lands- og steypakappingini í fjør. Tað grettir næstan ikki, at steypavinnararnir frá 2002 annaðhvørt skal spæla ímóti HB ella EB/Streymi í fyrsta umfari, og tá er liðið ongantíð komið víðari…

Samstundis sum kjakast kann um styrkimeting ella ikki, so eru fleiri av teirri áskoðan, at júst ein steypakapping verður stuttligari av, at lægri mett lið kunnu koma langt. Trý, sum í øllum førum hava møguleikan at koma í fjórðingsfinalurnar, eru Royn, FC Hoyvík ella TB, tí eitt av teimum kemur við vissu víðari.

## Løgmanssteypið

**Undanumfar, 20. mars:**
Royn-FC Hoyvík
MB-Skála
FF Giza-Undri

**1. umfar: 27. mars**
HB-B36
FF Giza/Undri-ÍF
AB-KÍ
B71-Víkingur
EB/Streymur-NSÍ
B68-07 Vestur
Royn/FC Hoyvík-TB
FC Suðuroy-MB/Skála

*Nýtt lutakast verður til fjórðingsfinalurnar*

## Kvinnusteypið

**Undanumfar, 11. apríl:**
B36-ÍF
B68/NSÍ-HB

**Fjórðingsfinalur, 30. apríl:**
KÍ-AB
Skála-EB/Streymur
Víkingur-MB
B36/ÍF-B68/NSÍ/HB

*Nýtt lutakast verður til hálvfinalurnar*